almannastovan

## Kunning frá Almannastovuni til fyritíðarpensjonistar omanfyri 60 ár

**Lógarbroyting við gildi frá 1. januar 2009**

*Aldursmark broytt*
Við gildi frá 1. januar 2009 eru aldurstreytirnar fyri at fáa fyritíðarpensjón broyttar. Nú kunnu persónar yvir 60 ár fáa hægstu fyritíðarpensjón, um teir eru mettir varandi óarbeiðsførir orsakað av avlamni. Higartil hevur ikki borið til at fáa hægstu pensjón aftaná fylta 60. árið.

Somuleiðis kunnu persónar yvir 60 ár, hvørs arbeiðsførið er mett niðursett við 2/3 ella meiri, við gildi frá 1. januar 2009 fáa miðal fyritíðarpensjón. Nú fáa hesi lægstu fyritíðarpensjón.

*Møguligt at søkja um hækkan av fyritíðarpensjón aftaná fylta 60. árið*
Eftir 1. januar 2009 verður møguligt hjá pensjonistum, sum fáa miðal fyritíðarpensjón, at søkja um hækkan av pensjón aftaná, at teir hava fylt 60 ár, um teirra avlamni er versnað síðan fyritíðarpensjónin var játtað. Higartil hevur bara verið møguligt hjá fyritíðarpensjonistum omanfyri 60 ár, sum fáa lægstu fyritíðarpensjón at søkja um hækkan av pensjón.

Viðmerkjast skal, at fyritíðarpensjón bara kann játtast til persónar undir 67 ár.

*Fráboðan til Almannastovuna*
Pensjónin hjá fyritíðarpensjonistum, sum hava fingið tilluta pensjón aftaná fylta 60. árið, og sum fáa

- miðal fyritíðarpensjón og eru mettir óarbeiðsførir sambært avgerðarskriv frá Almannastovuni ella V anlukkutryggingarráðnum, ið varð sent í sambandi við tillutan av fyritíðarpensjónini,
- lægstu fyritíðarpensjón og sambært avgerðarskrivi frá Almannastovuni ella Vanlukkutryggingarráðnum hava eitt arbeiðsføri, ið er skert við 2/3 ella meiri

skal ikki viðgerðast av nýggjum. Men tað er neyðugt at boða Almannastovuni frá – antin við at ringja inn ella skriva til okkara.

Umsókn um hækkan orsakað av versnaðum avlamni

Umsókn um hækkan av fyritíðarpensjón grundað á, at avlamni er versnað, síðan pensjónin var tillutað, skal latast Almannastovuni á serligum umsóknarblaði, sum fæst við at venda sær til eina av økisdeildunum. Fyritreytin fyri at viðgera umsóknina er, at ein almenn heilsukanning/-váttan verður útvega frá kommunulæknanum. Almannastovan tekur í hvørjum einstøkum føri støðu til, um neyðugt er at innheinta serlæknaváttan fyri at kunna viðgera málið.

Víst verður til løgtingslóg nr. 112 frá 11. desember 2007 um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir.

**Økisdeildin í Tórshavn**
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
tlf. 35 35 70 – fax 35 35 71

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
tlf. 45 72 40 – fax 45 72 41

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
tlf. 47 47 10 – fax 47 47 11

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
tlf. 35 35 60 – fax 35 35 61

## ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN

Eldri maður søkir íbúð í Tórshavn frá 1.februar

Eri friðarligur og fari væl um

**Ring á tlf. 22 00 22**

## Frá Føroya Fiskimannafelag

Uppskot, sum skulu leggjast fram á Landsfundinum 29. des., skulu vera okkum í hendi innan 15. des.

Føroya Fiskimannafelag

## Stórt øki og hølir á Hjalla 6 til leigu

Herviđ verður økið og hølini, sum Reyni Service leigar á Hjalla 6, lýst til leigu.

**Tel. 21 73 00**

GISTING V/MORGUNMATI · SKEIÐ · FUNDARVIRKSEMI




Tel. 238877 · info@hotelrunavik.fo · www.hotelrunavik.fo



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

Sosialurin -har tað hendir

## Selja bilin?

– set hann í Sosialin!




Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin – blaðið øll lesa!

Sosialurin

Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo